# Sóu stórar fyrimunir í at kasta saman í eitt felag

**– Hóast vit hvør sær hava havt nóg mikið at gera dugdu vit báðir at síggja fyrimunir í at kasta saman, siga teir báðir Eyðun og Rasmus, sum júst hava stovnað fyritøkuna El & Tele**

ELI GUTTESEN

**Kappingin í føroyska vinnulívinum harnar í hvørjum. Hetta eru teir báðir Eyðun Egholm og Rasmus Magnussen greiðir yvir, og tí hava teir nú avgjørt at kasta síni virki saman í eitt og sama felag.**

Eyðun hevur rikið sítt virksemi undir egnum navni meðan Rasmus hevur havt smápartafelagið Ravmagn.

Sum góðkendur el-innleggjari og við fýra monnum í arbeiði hevði Rasmus mest við el at gera, meðan Eyðun, sum útbúgvin elektrikari og eftir 18 ára starvstíð á Telefonverkinum, hevði drúgvar royndir á teleøkinum.

Undir felagsnavninum El & Tele, taka teir nú kappingina upp við millum onnur Føroya Tele.

Styrkin hjá nýggja felagnum er, at tað er ført førir fyri at bjóða sínum viðskiftafólki eina breiða tænastu innan el, edv og telekerv.

Sostatt nýtist ongum at renna frá einum til annan fyri at fáa el-, tele- og edvkerv uppsett, tí fyritøkan er før fyri at dekka øll hesi øki og kann geva tilboð upp á alt slíkt arbeiði og alla útgerð, sum neyðug er til tess at útvega lidnar loysnir til kundan.

### Breiðari og betri tænastu

– Samstarvið gevur okkum betri møguleika fyri at útvega lidnar loysnir til eitt nógv breiðari øki, sum tíbetur er í stóra menning, sigur Rasmus Magnussen.

Her sipar hann til kunningartøkni og ymiskar elektroniskar skipanir, sum eisini hava funnið vegin fram til føroyskar fyritøkur.

– Umframt alt vanliga el-arbeiði fyri vanligar privatkundar so hevur nógv av okkara virksemi higartil verið at gjørt el- og netloysnir til føroyskar fyritøkur, almennar stovnar og skip, sigur Rasmus Magnussen.

– Tíbetur fyri okkum so vinnur tøknin alt meira fram í Føroyum og hetta gevur økkum alsamt fleiri tænastur at røkja, tí streymur skal so ella so til alla útgerðina og har er tað ið vit koma inn í myndina, sigur Rasmus Magnussen.

### Hatta er søga

– Áður var tað so, at best sum elinnleggjarin var liðugur, so kom ein telefonmontørur at gera okkurt afturat og síðani onkur annar at gera edv. Men hjá okkum er hetta nú søga, sigur Rasmus Magnussen.

– Eitt er tað, at vit nú kunnu bjóða kundunum eina breiða tænastu innan el og tele, men umframt hetta eru vit eisini førir fyri at útvega alla útgerðina, sum skal til, sigur Eyðun Egholm.

Sølubúðin í Fjalsgøtu 13 er longu prýdd við alskyns teleutgerð og teir siga seg kunnu útvega øll tey kendu merkini til kappingarførar prísir.

Báðir vænta teir sær nógv av samstarvinum og gongur tað, sum tað gekk í fjør, fer umsetningurin helst at liggja millum einar 3 og 4 milliónir krónur.

Hóast fyritøkan marknaðarførir seg undir El og tele, so er tað í veruleikanum smápartafelagið Ravmagn, sum nú heldur fram. Men nú eigur Eyðun 30 prosent av partapenginginum meðan Rasmus, sum áður átti allan partapeningin, nú eigur 70 prosent.

Samstarvið teirra millum hevur verið gott í longri og nú í uppgávurnar gjørdust størri og størri hildu teir tað vera skilabest at kasta saman.

– Skal eg siga tað stutt, so kunnu vit útvega, selja og gera alt innan okkara økið og nú samstarvið er formaliserað, standa vit betri í kappingini um at vinna enn størri marknað, samstundis sum vit kunnu bjóða okkara kundum eina enn betri tænastu, sigur Rasmus Magnussen.

Báðir vænta teir sær nógv av samstarvinum, og vit fara at ynskja teimum og teirra starvsfólki góða eydnu.

**Hesir báðir smílandi jassarnir eru nú farnir í áhugavert samstarv. Vm. telefonmaðurin, Eyðun Egholm og høgrumegin, el-innleggjarin, Rasmus Magnussen. Saman kalla teir seg nú El & Tele**

Mynd: Kalmar

# Fólkatingið hevur samtykt markið

**Fyrrapartin fríggjadagin samtykti Fólkatingið einmælt marknaavtaluna millum Føroyar og Bretland. Føroysku fólkatingslimirnir nýttu á hvør sín hátt at takka dønum við ómakin**

INGI RASMUSSEN

Tað var sannur hátíðardamur í Fólkatinginum, tá markið millum Bretland og Føroyar fekk einmælta undirtøku frá fólkatingslimunum á teirra síðsta fundi í hesi tingsetuni.

107 fólkatingslimir atkvøddu klokkan 11 í gjár fyri fólkatingsmáli nr. B 143, sum snúði seg um Danmarkar undirtøku fyri marknaskjalinum, sum Føroyar og Danmark øðrumegin og Bretland hinumegin skrivaðu undir í Havn 18. maj.

Óli Breckmann nýtti høvi at takka øllum fólkatingslimunum fyri stuðulin. Samstundis veitti hann øllum donsku stjórnunum síðani 1976, tá miðlinjumarkið var sett sum mál, eina tøkk fyri teirra lut.

– Hetta er ein stórur hátíðardagur – tann størsti síðani 1948, segði Óli Breckmann, sum undirstrikaði hátíðardámin og takksemi við føroyska búnanum hann bar.

Jóannes Eidesgaard segði seg vera líka takksaman sum Óla Breckmann, hóast hann ikki var farin í lænt klæði.

Hann vísti á, at samráðingarrundurnar, sum byrjaðu í 1994, hava prógvað, at tað ber til at menna og útbyggja ríkisfelagsskapin.

– Við smidleika er møguleiki fyri at geva føroyingum tann neyðuga myndugleikan, so Føroyar og Danmark kunnu halda fram í tí samstarvi, sum londini higartil hava verið saman um, segði Jóannes Eidesgaard.

Danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, sum sjálvur triði hevur undirskrivað sáttmálan, segði avtaluna vera eitt nýtt kapittul í Føroya søgu.

– Hon gevur føroyingum møguleikar, sum ikki áður hava verið til staðar, segði hann.

Og so var leyst og liðugt. Fólkatingið fór heim, Óli Breckmann kundi pakkað føroysku klæðini niður aftur til Ólavsøkuskrúðgonguna, og sáttmálin, sum hevur verið so leingi ávegis, hevur fingið samtykt frá tveimum triðingum av teimum íblandaðu.

Eftir at geva sína samtykt er nú bara bretska parlamentið, áðrenn langa hólmgongan endiliga hevur fingið tá síðstu oljuna.

# Fundur um grønar útbúgvingar

Í døgunum 29. mai til 2. juni eru 10 fólk frá Det faglige Fællesudvalg for Gartneri á vitjan í Føroyum. Det faglige Fællesudvalg for Gartneri er yrkisútbúgvingarmyndugleikin í Danmark innan gartnara útbúgvingarnar. Skógrøktin er biðin um at fyriskipa vitjanina.

Ørindini higar eru at kunna seg við føroysk viðurskifti - bæði tey náttúrugivnu og við fyritøkur og almennar stovnar, ið virka á tí grøna yrkisøkinum.

Orsøkin til Føroyaferðina er, at Føroya Læruráð í 1997 setti nakrar av teimum grønu yrkisútbúgvingunum (gartnari og skógbrúkari) í gildi í Føroyum. Hesar útbúgvingar verða fyriskipaðar í samstarvi við danskar myndugleikar, tí at lærlingarnir ganga í danskan yrkisskúla.

Nøkur ungfólk eru longu í læru í Føroyum eftir hesi skipanini, og onnur eru væntandi.

Det faglige Fællesudvalg ynskir tí at kunna seg um virksemið og yrkisstøðið á tí grøna yrkisøkinum í Føroyum, til at vissa seg um dygdina á føroysku læruplássunum v.m.

Umframt at hitta umboð fyri føroysku yrkisútbúgvingarmyndugleikarnar, og at vitja vinnuna, verður eisini ferðast nakað um oyggjarnar.

Týsdagin 1. juni kl. 17.00 verður almennur fundur í Havn á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin, har kunnað verður um grønar yrkisútbúgvingar. Tá fer afdelingschef Claus Christensen frá Det faglige Fællesudvalg at kunna um tann partin av donsku »Erhvervsuddannelserne«, ið verður nevndur »Gartneri-Land-Skovbrug«.

Somuleiðis verður greitt frá lærumøguleikunum í Føroyum.

Djursland - *Stena Hotel Grenå*

**Makligt lív undir Molsfjøllunum**

Stena Hotel, ið er eitt av fremstu hotellum í Grenå, liggur nær havnaøki, baðistrond og viðarlund.

**Í dupultkamari í 1 viku**
**Fyri hvønn......Kr. 4.550,-**

Fráferð úr Føroyum hvønn leygardag frá 19/6 - 14/8

Íroknað prísin er flogferð við ferðaavgjøldum og innivist á Stena Hotel í eina viku við morgunmati.

Stavanger - *Comfort Hotel Grand*

**Ørandi upplivingar**

Stavanger er ein altjóða teknopolis, við ríkum og fjølbroyttum mentunarlívið.

**Í dupultkamari í 1 viku**
**Fyri hvønn......Kr. 4.825,-**

Fráferð úr Føroyum hvønn mikudag frá 23/6 - 11/8

Íroknað prísin er flogferð við ferðaavgjøldum og innivist á Comfort Hotel í eina viku við morgunmati.

Langt Vikuskifti - *hósdag til sunnudag*

**Billund - Hotel Legoland**

Upplivið eina legoverð í pinkustødd við børnunum og njótið lívið á frálíka Hotel Legoland, sum er kent fyri sín góða mat og hugnaligu barr.

**Fyri hvønn vaksnan á dupultkamari**
**.......................Kr. 4.480,-**
**Børn 2 - 11 ár..........Kr. 1.465,-**

Fráferð úr Føroyum hósdag og sunnudag frá 20/6 - 15/8

Íroknað prísin er flogferð við ferðaavgjøldum og innivist á Hotel Legoland við morgunmati.

Langt Vikuskifti - *hósdag til mánadag*

**Aberdeen - Patio Hotel**

Aberdeen blóma Skotlands við teimum vøkru urtagørðunum, frálíku matstovunum og góðu handlunum. Njótið lívið á nýggja Patio Hotel, sum hevur innandura svimjihyl, boblubað og ítrivsrúm.

**Fyri hvønn í dupultkamari við bað**

| | |
|---|---|
| 1/4 - 14/6 & 15/8 - 22/10 | Kr. 3.655,- |
| 14/6 - 15/8 | Kr. 3.895,- |

Íroknað prísin er flogferð við ferðaavgjøldum og innivist á Patio Hotel við morgunmati

Ferðirnar kunnu bíleggjast á øllum ferðaskrivstovum kring landið.

Atlantic Airways
Tel 333 900 · Fax 333 380

SAMSKIFT TEL 355 355

4 fólk í bili

Til

Ferðist bíliga, Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin

**Danmarkar**

Frá: Tórshavn
21/5, 28/5, 4/6, 11/6, 18/6, 27/8, 3/9, 10/9, 15/9
Frá: Hanstholm
22/5, 29/5, 5/6, 12/6, 19/6, 14/8, 21/8, 28/8, 4/9, 11/9

úr einans **753,-** fyri hvønn

Til

Ferðist bíliga, Tórshavn - Bergen ella hinvegin

**Noregs**

úr einans **465,-** fyri hvønn

Til

Ferðist bíliga, Tórshavn - Lerwick ella hinvegin

**Hetlands**

úr einans **375,-** fyri hvønn

Til

Ferðist bíliga, Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin

**Íslands**

Frá: Tórshavn,
26/5, 2/6, 9/6, 16/6, 23/6, 11/8, 18/8, 25/8, 1/9, 8/9, 13/9
Frá: Seyðisfjørður
27/5, 3/6, 10/6, 17/6, 24/6, 26/8, 2/9, 9/9, 14/9

úr einans **705,-** fyri hvønn

Til

Ferðist bíliga, Tórshavn - Hetland-Skotland ella hinvegin

**Skotlands**

úr einans **1.135,-** fyri hvønn

Ring og hoyr meira!

**31 59 00**